

STULDUR

*Umframt pengar høvdu russararnir eisini fartelefonir í skiftirúminum hjá Skála*

# Russar stolið úr skiftirúmi

**STULDUR Fríggjakvøldið fekk løgreglan í Runavík boð um stuldur úr skiftirúminum í Ítróttahøllini á Skála, har heimaliðið hevði vitjan av ÍF**

Leo Poulsen

Vikuskiftið hevur verið stak friðarligt hjá løgregluni kring landið. Okkurt hendinga harðskapsmál, tvey føri av rúsdrekkakoyring, og annars vanliga sjabbið við at taka full fólk upp.

Kortini var ein eitt sindur álvarsom hending á Skála fríggjakvøldið, tá tríggir russar eftir øllum at døma gjørdu sær dælt av føroyska gestablídninum.

Skála hevði heimadyst móti ÍF, og á veg av vøllinum aftur møtir fyrsti leikarin trimum russum í hurðini. Tað var so skjótt, at leikararnir varnast, at bæði pengar og fartelefonir mangla.

Leikarar fara tí saman við øðrum beina leið oman á keiina, har ein russiskur trolari liggur, og eini russin verður kendur aftur sum ein av teimum trimum monnunum, sum leikarin møtti í hurðini.

Russin var sinnaður at tosa, men hann hevði ongar av stolnu lutunum uppi á sær, og tað er ikki bara sum at siga tað at fara umborð á eitt russiskt skip, sjálvt um tað liggur við bryggju í Føroyum.

– Juridiskt er skipið at rokna sum russisk jørð, og tí kunnu vit ikki bara fara umborð at ransaka kamarið hjá viðkomandi russa. Vit mugu fáa loyvi frá skiparanum at gera hetta, og tað hava vit ikki fingið enn, sigur Halgrím Hansen, varaleiðari fyri Eysturøkið.

Tað var um 21 tíðina fríggjakvøldið, at løgreglan fekk boðini, og tann eini maðurin er nú skuldsettur í málinum.

– Onnur vóru farin oman á keiina eisini, tí tey høvdu eisini verið útsett fyri stuldri, sigur Halgrím Hansen.

## Einki nýtt um Heina

Halgrím Hansen, varaleiðari fyri Eysturøkið, er eisini samskipari og hevur staðið á odda fyri leitingini eftir Heina Olsen, ið hvarv fyri nøkrum vikum síðani. Og har er einki nýtt at frætta í málinum.

– Teldan og fartelefonin eru nú hjá løgregluni í Havn, sum ger nærri kanningar av lutunum. Men enn er ikki serliga nógv nýtt at frætta frá teimum kanningunum. Eg veit, at Heini Olsen hevði spælt tónleik á telduni, men annars ikki nógv annað, sigur Halgrím Hansen.

Hann vísir til, at telduserfrøðingarnir hjá løgregluni hava úr at gera í sambandi við nevningatingið, sum í hesum døgum er í Havn móti teimum báðum litavunum, ið eru ákærdir fyri at smugla rúsevni.

– Í síðstu viku komu tvey tips inn í málinum um Heina Olsen, men síðani hevur einki verið. Ofta er tað so, at tey tips vit fáa er slíkt, sum vit framman undan hava kannað, sigur Halgrím Hansen.

Tað er ikki heilt greitt, nær kanningarnar av teldu og fartelefon eru lidnar, men tað er kortini ivasamt, um tær kanningarnar fara at føra til nýggj spor í málinum.

*leo@sosialurin.fo*





**ONGA VIÐMERKING**

*Skuldi eitt kjak verið um kavaraútbúgvingina, skuldi tað verið fyri trimum árum síðani, sigur Kartni Jacobsen*

# Ongan hug til viðmerkingar

**KAVARAÚTBÚGVING Vit hava bara handlað út frá tí, sum Arbeiðseftirlitið hevur rátt okkum til, og longri er tann søgan ikki, sigur Kartni Jacobsen, brandmeistari**

Leo Poulsen

Kartni Jacobsen hevur ikki hug at gera viðmerkingar til tað, sum Ingi Sørensen førdi fram í Sosialinum mikudagin í farnu viku.

Ingi Sørensen fílist á, at lógir og reglugerðir ikki fylgja altjóða reglum á kavaraøkinum, og hann heldur tað vera ov vánaligt, at føroyskar útbúgvingar eru á slíkum støði, at tær bert eru galdandi í føroyskum sjóøki.

Brandmeistarin hevur tó onga hug at fara út í eitt kjak um hetta og vísir til, at teir bert vóru áhugaðir í at fáa útbúgvi nakrar bajrgingarkavarar.

– Okkara áhugi er at fáa nakrar kavarar, sum eina myrka nátt kunnu kava niður við molanum til antin at bjarga einum menniskjalívi ella í ringasta føri at taka eitt lík upp. Vit hava ongan áhuga í at fremja vinnukaving á nakran hátt, sigur Kartni Jacobsen.

Hann heldur, at tað hóast alt nú eru komar reglur á økinum, og at skuldi eitt kjak stungið seg upp, skuldi tað verið fyri trimum árum síðani.

– Men eg havi ikki hug at luttaka í tí kjakinum nú, sigur Kartni Jacobsen, brandmeistari.

*leo@sosialurin.fo*